tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Kambskarð Sørensen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattatøl januar 2017 | 3 |
| 2 | Støðutakan til skrivstovuhøli hjá Sernám í Suðuroynni | 3 |
| 3 | Kunning um fíggjarætlan hjá Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy fyri 2017 | 4 |
| 4 | Uppskot til broyting í kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu | 5 |
| 5 | Uppskot til broyting í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar kommunu | 6 |
| 6 | Linjuføringin í Hvalbiartunnlinum | 7 |
| 7 | Støðutakan til fíggjarligan stuðul til TB fótbóltur | 8 |
| 8 | Reglugerð fyri flogfenaðhald (húsdýrahald) í Tvøroyrar Kommunu | 9 |
| 9 | Umsókn frá borgarstjóranum smb. § 6, stk. 2, 5. pkt. | 10 |
| 10 | Støðutakan til skeiðsdagar umborð á Norrønu, sum Kommunufelagið skipar fyri | 11 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

11 Støðutakan til heimild, at skriva undir skjøl vegna kommununa smb. § 44, stk. 2 í kommunustýrislógini 12

12 SEV - fráboðan til eykaaðalfund 24. februar 2017 12



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.00.00-I00-1-17**

## 1. Skattatøl januar 2017

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri januar 2017.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina um skattatølini fyri januar til eftirtektar.

### Skjøl

- Skattur 2017 samanborið við undanfarin ár
- Samanbering av skatti januar 2017

**00.17.00-A00-4-16**

## 2. Støðutakan til skrivstovuhøli hjá Sernám í Suðuroynni

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin í Vági Dennis Holm við teldubrævið, dagfest 22. desember 2016, har hann heitir á kommunurnar í Suðuroynni um at taka undir við, at Sernám skiftir bústað frá Vágsvegi 89 (har Sernám hevði bústað frá stovnan inntil 1. apríl
2016) til Vágsveg 61 (SEV-húsið). Dennis Holm leggur afturat, at Sernám hevur í eitt tíðarskeið, uttan leigukostnað ella aðrar útreiðslur, havt fyribils skrivstovur á Vágsvegi 22. Fyri Tvøroyrar kommunu verður árliga gjaldið til skrivstovuhaldið hjá Sernám í Vági áleið kr. 34.000,-

Síðani niðurstøðuna hjá Býráðnum tann 31. desember 2016 hevur tað verið eitt skrivligt samskifti millum stjóran á Sernámi og kommunustjóran hjá Tvøroyrar kommunu. Í hesum samskifti er komið fram, at Sernám ynskir eina skjóta loysn áðrenn 1. februar í ár og at kommunurnar í Suðuroynni semjast um eina staðseting av skrivstovuhølinum. Um ikki ein loysn finst á staðsetingini áðrenn 1. februar verða



Formansváttan

journalirnar fluttar norðuraftur til høvuðsdeildina sambært stjóranum á Sernámi. Spurd, upplýsir stjórin á Sernámi, at tað fakliga er eingin munur á, hvar skrivstovuhølini liggja geografiskt í Suðuroynni.

Stjórin á Sernámi rykkir í teldubrævið tann 31. januar 2017 til kommununar í Suðuroynni eftir einari loysn av málinum.

**Býráðið, 9. januar 2017, pkt. 3:**

Tvøroyrar Býráð samtykti einmælt, at býráðssamtyktin frá 31. desember 2016 stendur við.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at býráðssamtyktirnar frá 31. desember 2016 og 9. januar 2017 standa við, sum tilmæla, at Sernám verður staðsett á Tvøroyri.

Býráðið viðmerkti einmælt, at tað hevur stóran týdning, at størvini innan virkisøki hjá Sernámi vera verandi í Suðuroynni og ikki flutt norður aftur til Tórshavn.

### Skjøl

- Bræv frá stjóranum í Sernámi til kommunurnar í Suðuroy
- Bræv frá Dennis Holm viðvíkjandi staðseting av Sernám
- Dagsordenspunkt Støðutakan til skrivstovuhøli hjá Sernám í Suðuroynni behandlet på mødet 9. jan.docx

**00.01.10-A00-4-17**

## 3. Kunning um fíggjarætlan hjá Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy fyri 2017

### Málsfrágreiðing

Fíggjarætlan hjá Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy fyri 2017 send til Tvøroyrar kommunu. Fíggjarætlanin er áljóðandi 51,570 mió. kr. fyri íalt 872 eldri íbúgvar í Suðuroynni. Har av skal Tvøroyrar kommuna gjalda 17,564 mió. kr. fyri 297 eldri íbúgvar. Sambært Annu Djurhuus, leiðara í Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy, er talan um eina fyribils fíggjarætlan, sum er løgd inn sum



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

kommunal millumrokning hjá Gjaldstovuni til leysgeving hjá kommununum eftir boðum úr Fíggjarmálaráðnum. Fíggjarætlanin verður sambært Onnu Djurhuus enduskoðað í næstum.

Í fíggjarætlanini fyri 2017 hevur Tvøroyrar Býráð sett 16.720 mió. kr. av til eldrasamstarvið í Suðuroynni. Tað vil siga ein meirkostnað á 844 tús. kr. til eldrasamstarvið í 2017. Tvøroyrar kommuna hevur tí ikki enn leysgivið nevndu upphædd samsvarandi umbønini frá Bú- og Heimatænastuni í Suðuroy. Tvøroyrar kommuna hevur leysgivið 1/12 av játtanini til eldrasamstarvið, sum er ásett í fíggjarætlanini hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2017.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina um fyribils fíggjarætlanina hjá Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy til eftirtektar.

### Skjøl

- Fíggjarætlanin hjá BHS fyri 2017.pdf

**00.01.10-A00-2-17**

## 4. Uppskot til broyting í kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

1. viðgerð av uppskoti til broyting í kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu. Talan er um broytingar í pørtunum 5 og 6 um skipan av nevndum.

### Avgerð

Býráðið tók við 1. viðgerð einmælt undir við at gera nevndu broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Tvøroyrar kommunu, sum lýstar eru í viðfesta notati frá kommunustjóranum.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Skjøl

- Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu
- Notat til Tvøroyrar Býráð í sambandi við 1. viðgerð av broyting í kommunustýrisskipanini

**00.01.10-A00-3-17**

## 5. Uppskot til broyting í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

1. viðgerð av uppskoti til broyting í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar kommunu. Talan er um broytingar í pkt. 3 í starvsfólkaskipanini um samanseting av setanarbólki í sambandi við setan av ávíkavist starvsfólkum og leiðarum í kommununi. Møguligar aðrar smærri broytingar í orðingum í starvsfólkaskipanini verða eisini gjørdar.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt við 1. viðgerð, at fylgja tilmælinum frá kommunustjóranum um, at gera broytingar í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar kommunu viðvíkjandi samanseting av setanarbólki.

### Skjøl

- Starvsfólkaskipanin hjá Tvøroyrar kommunu
- Notat til Tvøroyrar Býráð í sambandi við 1. viðgerð av broytingum í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyr



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**05.03.05-G01-1-17**

## 6. Linjuføringin í Hvalbiartunnlinum

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin á Tvøroyri og borgarstjórin í Hvalba hava verið á fundi við landsstýrismannin samferðslumálum, Henrik Old, og stjóran á Landsverki, Evald Kjølbro umframt Johannes Jensen frá Landsverki, har linjuføringin í nýggja Hvalbiartunnlinum bleiv umrødd. Á tí fundinum var semja um, at Tvøroyrar Býráð og Hvalbiar Bygdarráð samtykkja viðfesta uppskot til linjuføring og fráboðað landsstýrismannin og stjóran á Landsverki um samtyktina.

**Tekniska nevnd, 6. februar 2017, pkt. 12:**

Nevndin mælir til, at linjuføringin í Hvalbiartunlinum verður soleiðis, at hon kemur út beint vestan fyri viðarlundina í Trongisvági.
Hetta er linjuføringin er víst við reyðum á hjálagda kortinum.
Málið verður beint í býráðið.

### Avgerð

Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og at hetta tilmæli verður sent landsstýrismanninum í samferðslumálum umframt Landsverki til kunningar. Harumframt ynskir Býráðið, at Tvøroyrar kommuna samskiftir við Landsverk um brúk av grótinum frá tunnlinum og viðvíkjandi viðurskiftum kring gamla Hvalbiar-tunnilin.

### Skjøl

- Dagsordenspunkt Linjuføring Hvalbiartunnil behandlet på mødet 6. februar 2017 kl. 1315 (Býráðss.docx
- 20170203_224916.jpg
- VS Nýggja linjuføringin



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**18.20.00-I00-1-17**

## 7. Støðutakan til fíggjarligan stuðul til TB fótbóltur

### Málsfrágreiðing

Fíggjarligi stuðulin til TB fótbóltur fyri 2017 til umrøðu og støðutakan. Í fíggjarætlanini fyri 2017 eru settar 300 tús. kr. av í beinleiðis stuðli.

Borgarstjórin og kommunustjórin høvdu fund við leiðsluna í TB fótbóltur tann 10. januar í ár, sí viðfestu frágreiðing.

Henrik Thomsen, varaformaður í TB, møtti á fundinum kl. 18:00 og greiddi frá um støðuna í TB.

### Avgerð

Býráðið tók einmælt undir við at TB brúkar fótbóltsvøllin við Stórá.

Býráðið tók kunningina frá Henrik Thomsen til eftirtektar, og málið verður tikið fram aftur til viðgerðar í mars mánaða.

### Skjøl

- Frágreiðing í sambandi við fund við leiðsluna í TB
- Svar til Henrik Thomsen í.s.v. fund í gjár 10. januar við umboð fyri TB og felagsliðið í fótbólti í.
- Teldubræv frá Henrik Thomsen í.s.v. fund við kommununa tann 10. januar



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**09.18.01-P21-1-17**

## 8. Reglugerð fyri flogfenaðhald (húsdýrahald) í Tvøroyrar Kommunu

### Málsfrágreiðing

Viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni:

Vit hava nú lisið tykkara uppskot og hava gjørt hesar viðmerkingar:

- Heimild: Reglugerðin eigur ikki at hava heimild í aðrari grein í k. um umhvørvisreglur, enn í § 26.

- Bæði umhvørvisverndarlógin og kunngerðin um umhvørvisreglur eru broyttar síðani 2005. Tí er neyðugt at skoyta ".... við seinni broytingum..." uppí tilvísingarnar til lógina og kunngerðina, t.e. í innganginum og í § 8.

- Til § 4 um grannar. Hóast tað í fleiri føri kann vera gott at kunna grannan, so fara vit biðja Tvøroyrar kommunu um at umhugsa at strika grannan úr reglugerðini. Grundgevingin er, at so leingi, ein borgari heldur seg til reglurnar, so er grannin ikki viðkomandi. Serliga er tað óheppið, at tað er grannin, sum skal samtykkja frávik.
Grannar valdast og nýggir grannar kunnu koma. Við at strika grannan sleppa tit eisini undan, at ymiskar reglur fyri somu viðurskifti eru praksis í somu kommunu. Nakað annað er, at um so er, at ein granni er lagaligur, so fer hann heldur ikki at klaga, og so er einki mál. Eisini lættari hjá kommununi at umsita.

- Til § 5: Vit skjóta upp, at tit umorðað setningin « Um húsdýrahald av flogfenaði, hóast reglugerðina, elvir til ampa, sum stink, gang, nógva flugu, rottu, kann Tvøroyrar kommuna seta forboð fyri haldinum ella áleggja treytir fyri at flogfenaðhaldið kann halda fram» til « Um húsdýrahald av flogfenaði elvir til ampa, sum stink, gang, nógva flugu, rottu, kann Tvøroyrar kommuna geva eigaranum boð um at fylgja reglugerðini. Um boð ikki verða hildin, kann kommuna seta forboð fyri haldinum».
Seinni setningurin er í betri samsvari við § 23, stk. 2 í k. um umhvørvisreglur.

TVØROYRAR KOMMUNA
tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo
Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri



· Til § 7: Kærumyndugleikin er nú Umhvørvisstovan, og má ásetingin tí rættast samsvarandi. Umhugsið at broyta "Avgerðir hjá Tvøroyrar kommunu..." til "Boð ella forboð, sum Tvøroyrar kommuna gevur eftir hesi reglugerð... "

· Til § 8 um revsireglur. Vit mæla til, at tit umorða tekstin í uppskotinum til á leið hesa orðing: Verður boð ella forboð ikki fylgt, kann tað verða revsað við bót, hetta sambært § 41, stk. 1, pkt. 3 í k. um umhvørvisreglur.
Orðingin verður rættari, greiðari og meira ítøkilig. Borgararnir kenna betri avleiðingina av um reglugerðin ikki verður fylgd.

· Tit eiga at umhugsa, at skoyta ein reglu uppí um klagur. T.d. at klagur um brot á hesa reglugerð skulu sendast til Tvøroyrar kommunu.
Vinarliga send okkum eitt nýtt tillagað uppskot til góðkenningar.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevnd, 6. februar 2017, pkt. 3:**
Nevndin er kunnað um tillagingarnar í samtyktini, eftir áheitan frá Umhvørvisstovuni.

Mælt verður til at broyta samtyktina, sambært viðmerkingunum hjá Umhvørvisstovuni.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina um dagføringina av reglugerðini um flogfenað til eftirtektar.

### Skjøl

- Viðmerkingar til uppskot um reglugerð um flogfenaðhald
- Reglugerð fyri flogfenaðhald Tvøroyri 6_2_2017

**00.01.10-G00-1-17**

## 9. Umsókn frá borgarstjóranum smb. § 6, stk. 2, 5. pkt.

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin, Kristin Michelsen, kunnar um, at umsókn er komin frá honum um, at biðja Tvøroyrar Býráð játta honum loyvi til at halda fram í borgarstjórastarvinum fulla tíð samstundis sum hann situr á løgtingi. Hesa umsókn sambært § 6, stk. 2, 5 pkt. í kommunustýrislógini, sí viðfestu umsókn.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

4 býráðslimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Kambskarð Sørensen og Alvi Mortensen tóku undir við umsóknini og játtaðu, at Kristin Michelsen røkir borgarstjórastarvið fulla samtíðis sum hann situr á løgtingi.

1 býráðslimur: Súsanna Bertholdsen tók ikki undir við umsóknini og atkvøddi ímóti.

2 býráðslimir: Bjarni Hammer og Bogi Johannesen atkvøddu ikki.

### Skjøl

- Umsókn frá borgarstjóranum eftir § 6, stk. 2, 5 punkt í kommunustýrislógini

**00.01.10-I00-6-17**

## 10. Støðutakan til skeiðsdagar umborð á Norrønu, sum Kommunufelagið skipar fyri

### Málsfrágreiðing

Kommunufelagið skipar fyri skeiðsdøgum fyri kommunustýrislimum umborð á Norrønu til Íslands í døgunum 27-30 mars 2017. Kostnaður pr. persón kr. 3.000,-

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fíggja evnistúr til Íslands við Norrønu, sum Kommunufelagið skipar fyri. 6 av 7 býráðslimum luttaka á túrinum.

### Skjøl

- Íslandsferð 27-30 mars fyribils skrá
- Íslandsferð 27-30. mars 2017



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 2/2017 |
|---|---|
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.10-A00-5-17**

## 11. Støðutakan til heimild, at skriva undir skjøl vegna kommununa smb. § 44, stk. 2 í kommunustýrislógini

### Málsfrágreiðing

Tinglýsingin á Umhvørvisstovuni við fyrispurningi, hvør annar persónur í umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu enn borgarstjórin hevur heimild, at skriva undir skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. Bý- og bygdaráð skulu aftaná hvørt kommunuval upplýsa Tinglýsingina hesum viðvíkjandi.

Borgarstjórin mælir til, at kommunustjóri Henrik Weihe Joensen - saman við borgarstjóranum - kann undirskriva skjøl um keyp og sølu av fastari ogn, lániskjølum, leigusáttmálar o.t. Somuleiðis mælir borgarstjórin til, at tað verður heimila varaborgarstjóranum Anitu Vibergsdóttir og fíggjarleiðaranum Amy Bech, at undirskriva nevndu skjøl, tá borgarstjórin og kommunustjórin hava feriu ella hava forfall.

### Avgerð

Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum hjá borgarstjóranum.

### Skjøl

- Fyrispurningur um heimild, at skriva skjøl hjá Tvøroyrar kommunu sbrt. § 44, stk. 2 í kommunustýris.

**13.01.00-I00-1-17**

## 12. SEV - fráboðan til eykaaðalfund 24. februar 2017

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um innbjóðing frá SEV um eykaaðalfund í felagnum tann 24. februar 2017. Tvøroyrar kommuna hevur 2 atkvøður á fundum í SEV og umboðið er Alvi Mortensen, býráðslimur, sum eisini hevur atkvøðurætt.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Avgerð

Býráðið tók kunningina til eftirtektar.

## Skjøl

- Skjøl - fráboðan til eykaaðalfund, fulltrúaváttan og tilmeldingarlisti



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 19:10**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Kambskarð Sørensen

Alvi Mortensen

Bjarni Hammer

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 2/2017 |
| Fundardagur | 13. februar 2017 kl. 17:00-19:10 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen



Formansváttan